# lin undir luppin



*Føroyingar mugu koma úr hesi felluni, har teir antin hálova ella hata alt, sum er danskt, sigur høvundurin Lisbeth Nebelong*

bæði í samveruni við onnur og í royndini at skapa egnan samleika.

## Gestur í egnum lívi

Spurningurin um at velja verður soleiðis eitt tema á fleiri stigum í *Færøblues*, har tað serliga er royndin hjá Kára at finna fótafesti í lívinum, ið drívur søguna fram.

Sum smádrongur er hann púra sannførdur um, at hann skal verða skipari, eins og pápin. Men longu á sínum fyrsta túri til skips fer hann at ivast. Hugurin til tónleikin dregur støðugt meir, og hóast hann veit, at pápin verður vónbrotin, velur hann ikki at fara við aftur skipinum. Ikki tí, at velja sjólívið hevði ikki á nakran hátt verið tann lættasta avgerðin – heldur tvørturímóti.

Fyri at fáa eina fatan av, júst hvat tað valið inniber, mynstraði Lisbeth Nebelong við línubátinum Bresti, meðan hon skrivaði *Færøblues*. Teir 14 dagararnar, hon var við skipinum, brúkti hon til at práta við manningina um milum annað lívið umborð og longsulin heim.

– Eitt, sum ofta gekk aftur í hesum prátum, var, at sjálvt um teir trivust fínt við at vera sjómenn, so hevði tað við sær, at teir ofta kendu seg sum gestir í teirra egna heimi, tá teir komu í land, greiðir hon frá.

Í bókini flytur Lisbeth Nebelong hesa kensluna av at vera gestur yvir á Kára, ið sum frá líður kennir seg sum gest í sínum egna lívi – eins og er hann við "í einum sjónleiki, har tey ikki høvdu ráð til ein leikstjóra og har eisini teskarin var tikin av lønarlistanum".

Til endan er Kári um at kvalast av hesum "føroyska tilstandinum", sum hann kallar tað, har snævurskygni og smáligheit gjøgnumsúrga alt. Hartil standa Føroyar sum ein nærum ítøkilig forðing fyri, at hann kann fylgja sínum dreymi um at gerast yrkistónleikari. 19 ára velur gamal hann tískil at flyta av landinum og sletta Føroyar úr sinninum.

## Ættarliðssøga

Fyri Kára er avgerðin um at rýma eitt slag av uppreistri og mótmæli. Hinvegin hevði hann neyvan havt hendan møguleikan, var tað ikki, tí hann er barn av 60'unum. Høvundurin dylur heldur ikki yvir, at hon við *Færøblues* hevur ynskt at lýsa sítt egna ættarlið, 60'ara ættarliðið, sum vóru tey fyrstu, ið av álvara høvdu møguleikan at velja egna lívsleið.

Hóast ættarliðssøgur frá hesum tíðarskeiðnum eru sæddar fyrr, heldur Lisbeth Nebelong, at tað ríkar genruna, at *Færøblues* er staðsett í Føroyum.

– Tað eru ikki skrivaðar serliga nógvar føroyskar skaldsøgur um hetta tíðarskeiðið, og eg haldi tað vera synd, um tað bara fer í gloymskuna. Eisini hevði eg hug at kanna, hvat tað ger við menniskju, tá ein so ógvuslig broyting fer fram í einum so lítlum samfelag, sigur Lisbeth Nebelong og sipar til skiftið frá traditionella fiskisamfelagnum til vælferðarsamfelagið.

Fyri Kára merkir hetta skiftið, at allur hansara samleiki sum føroyingur er hóttur. Ella sum pápábeiggi hansara sigur: "Tað er nú tú skal gera av, um tú vil vera verandi føroyingur ella um tú vilt verða professionellur tónleikari."

Eina tíð dregur Kári á bæði, har tað serliga er omman, og allur tann kendi tryggleikin, hon umboðar, ið fær hann at ivast. Kortini velur hann ikki bara at venda Føroyum bakið, men eisini at rista allan føroyska samleika av sær við millum annað at broyta mátan, hansara navn stavast.

## Váðaverk

Hóast Kári fær eitt gott lív uttanlands, er tað lítil ivi um, at hann kennir seg sum offur í mentanarliga og politiska tvídráttinum millum Føroyar og Danmark.

– Sum ungur er Kári fangaður í hasi antin-ella felluni, har hann skiftivís hatar og háðlovar øllum, sum er danskt. Hann fær heilt einfalt ikki rúma tankanum um, at tað kanska finst ein triði vegur, sigur Lisbeth Nebelong og leggur afturat, at trupulleikin er, at slíkur antin-ella hugburður rakar teg aftur sum ein bomerang, tí tú verður verandi fastlæstur og kemur ikki víðari

– Tað kann so vera ein forklåring. Men eg haldi ikki, at tað kann brúkast sum ein umbering longur fyri, at til dømis danska og føroyska tjóðin ikki kunnu koma til sættis á ein fruktagóðan hátt, sigur Lisbeth Nebelong.

Við Færøblues kemur høvundurin sjálv við einum boði uppá, hvussu hetta kann gerast veruleiki. Eftir 25 ár sum útiseti og eina langa vøkunátt á Hotel Føroyum, letur hon umsíðir Kára taka eina avgerandi støðu. Hann velur at taka børnini hjá sær við ein túr í Havnini og fortelja teimum um tey vøkru støðini, hann vaks upp í. Myndaliga verður hansara nýggja fatan av havnargøtum soleiðis hendan triðja gøtan, komandi ættarliðið roynir at ganga.

Fyri Kára krevur hetta eitt stórt dirvi, sum høvundurin ikki dylir yvir, at hon sjálv kennir seg aftur í

– Tú spurdi, um tað ikki er í so næsadjarvt av mær, at koma við eini bók, sum hesi. Jú, tað er tað, men tú ert noydd at vera djørv, um tú skal bjóða tunga okinum av fortíðini av. Í so máta er *Færøblues* avgjørt eitt váðaverk, viðgongur Lisbeth Nebelong og sær eitt sindur fjálturstungin út.

Kortini fegnast Lisbeth Nebelong um, at bókin nú liggur sum eitt ítøkiligt boð uppá, at tað ber til at bjóða spentu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark av.



*Sum lið í arbeiðinum við Færøblues mynstraði Lisbeth Nebelong við Bresti. Her er hon saman við fyrstameistaranum, Marneri Olsen, sum var ein týðandi íblástur til lýsingina í bókini av lívininum umborð. Mynd: Mikkel Krag*